Fylgiskjal 3

LM-117/2023

Ískoyti til almennu viðmerkingarnar:

Sambært almennu viðmerkingunum tekur uppskotið støði í eini breiðari politiskari semju um alivinnuna.
Ætlanin at gera eina tvílagaða skipan við tøkugjaldi og serskatti á vinning frá aling.

Fíggjarmálaráðið skal viðmerkja, at í løtuni er arbeiðið ávegis, um hvussu skipan við serskatti skal gerast. Hóast enn ikki er komið á mál, er greitt, at fleiri ivamál eru í hesum sambandi, m.a at skilmarka ta inntøku, sum skal skattast, tvs. virksemi frá smotlframleiðslu til sjógvaaling og tøku. Sambært semjuni er t.d. inntøka frá fóðurframleiðslu og framleiðsu av liðugtvørum, sum útgangsstøði ikki fevnd av inntøkugrundarlagnum, sum skal skattast, men tað kann vera trupult at skilja hesa inntøku frá øðrum virksemi.

Ymisk skattaprosent til feløg kunnu eggja til skattahugsan, og krevur fyrisitingarliga orku, bæði hjá vinnu og fyrisitingini hjá landinum.

Yvirskipað eru fyritøkur, sum fáast við alivirksemi, lutfalsliga stórar. Nógvar innanhýsis flytingar eru, og neyðugt er tí við greiðum regluverki, um skipanin skal verða skynsom og virka eftir sínum endamáli.

Tí er tilmæli hjá Fíggjarmálaráðnum, at broytingar í tøkugjøldunum vera lagdar fyri Løgtingið, tá skipanin við serskatti er klár. Tað gevur møguleika fyri, at Løgtingið kann viðgera samlaðu skipanina undir einum, og í lógarfyrireikandi arbeiðinum kann neyðugt atlit verða tikið til møgulig ivamál, sum kunnu stinga seg upp við serskattinum.

Vinarliga / kind regards

**Djóni Højgaard**
Fulltrúi / Advisor
Office: +298 352020
Mobile: +298 264477
djoni@fmr.fo

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Finance
Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 352020 / fmr@fmr.fo / www.fmr.fo